# Viðmerkingar til Veðurlagstilmælið frá Innlendismálaráðnum

Føroya Náttúruverndarfelag (FNU) hevur verið umboðað í fylgibólkinum hjá Innlendismálaráðnum/Løgmansskrivstovuni viðv. veðurlagsálitinum, og fylgt væl við hvussu umhvørvið/orkugongdin hevur verið her á landi, men kanska mest uttanlands.

Sigast kann, at álitið er sett upp við so at siga einasta ítøkiliga uppskotinum, at minka um orkunýtsluna/útlátið av koltvíiltu, at SEV kann byggja Víkarvatn út til savningarbrunn til nýtt elverk, ið byggjast skal niðri við fjøruna, nakað yvir av Eiðisverkinum.

Hoyrt er um eitt ov lágt ætlanarstøði og at minkingin í veðurlagsgassum skal verða størri, tó so at landstýriskvinnan Annika Olsen hevur nevnt at eftirmetingar skulu fremjast annaðhvørt ár um hvussu støðan/gongdin er í orkunýtsluni/útlátinum. Hetta broytir tó einki upp á uppskotið, sum tað fyriliggur.

Ítøkiliga skal samlaða fossila orkuminkingin verða 20% fram til 2020 roknað frá 2005 svarandi til umleið 45.000 tons av olju. Talan er um 4 serstakar brúkarar av olju, (í raðfylgju frá álitinum):

*Sí talvu*

| | | |
|---|---|---|
| 1. Upphiting, 50% minking í samlaðu nýtsluni á umleið | 60.000 tons | = 30.000 tons |
| 2. Ferðsla, 50% " | 15.000 " | = 7.500 " |
| 3. SEV/ravmagnsframleiðsla, 14% minking | 35.000 " | = 5.000 " |
| 4. Skip og flogfør, 5% minking (skip) | 79.000 " | = 5.000 " |
| 5. Annað, vinnuvirki v.m. (ikki í álitinum) | 37.000 " | = 0 |
| **Úrslit** | **226.000 tons** | **47.500 tons ( minking 21%)** |

Sum sæst er ikki heilt samsvar millum ætlaðu minking á 20% og tað sum álitið leggur upp til í einstøku sera tunt greinaðu 4 bólkunum.

FNU metur ikki at ein minking letur seg gera soleiðis sum uppskotið er sett upp. Ynskt kundi verið at málið varð sett hægri, men tá við annarleiðis minkingum í procentum enn víst verður til. Tó so er FNU fult vitandi um, at tað verður so gott sum ógjørligt at náa teim 20% tá fleiri tøkniligar loysnir ikki eru liðugt mentar at seta í staðin fyri oljuna. Harnæst er íløgukostnaður fyri nýggja framkomna tøkni óhugnaliga høgur, og verður eftir okkara meting neyðugt hjá landinum at gjalda fyri uppsetan av tøkni, meðan raksturin sjálvandi verður við brúkaragjaldi. Hugsað verður um vetni, ið er einasti orkuberði vit kunnu framleiða sjálvi. Alt annað skal flytast inn um tað so er rapsolja ella annað biobrennievni, methanol ella ethanol. Vit hava snøgt sagt ikki rávøru til egin framleiðslu av øðrum enn vetni. Kann verða at tari kann bíva til ethanol í framtíðini.

Vit skulu ikki her fara inn í hvussu ein umskipan av procentum kann verða annarleiðis enn tað Innlendismálaráðið setur upp, tó gera hesar viðmerkingar til einstøku 4 punktini og annars tað víst verður til í uppskotinum.

**Upphiting**

Vit hava 18.000 sethús og bygningar, ið upp á 10 ár skulu niður í eina helvt við orkunýtsluni. Hetta er tað sama sum 1.800 hús og bygningar hvør ár. Um vit siga at vit hava 200 arbeiðsdagar í einum ári, so merkir hetta, at 9 hús og bygningar skulu liðuggerast hvønn dag. Tá tað má roknast við at tað taka bæði tvær og fýra vikur at liðuggera eitt hús til slíka orkusparing, og at tað nokk eru millum 3 og 4 mans til hvørja uppgávu, so fáa vit eitt úrslit sum sigur at 27 til 36 handverkarar hvønn dag hava eitt hús liðugt. Í 3 til 4 vikur merkir hetta at millum 400 og 540 handverkarar eru til arbeiðis hvønn dag 200 dagar hvørt ár - í 10 ár.

Um hetta sýnist verunligt ella sum púrasta burturvið kann altíð kjakast um, men arbeiðsloysi innan byggivinnuna vildi so undir øllum umstøðum verið burtur.

Annarleiðis kann hugsast um tað er sýnligt at verandi privatur bústaðareigari hevur fíggjarligan møguleika at fremja slíka orkusparingaruppgávu, ið kann kosta 200 túsund krónur, men eisini 400 túsund. Ivi er um júst hetta letur seg gera, eisini við bíligum bjálvingar- ella orkulánum frá Húsalánsgrunninum. Kostnaðurin pr. ár fyri 1.800 hús og bygningar kann við umleið kr. 300.000 pr. bygning blíva góðar 540mill.kr. - ella 5,4 milliardir í 10 ár.

Næst kann tað almenna ikki krevja at verandi bústaðir og privat vinnuvirki skulu fremja hesa orkusparing.

Í samband við júst orkusparingar og orkunýtslu í húsum og bygningum hevur Innlendismálaráðið heitt á Landsverk at fremja uppskot til landsbyggireglurerð, ið víst nokk skal verða liðug um góð 2 ár. Orkuparturin varð annars frá Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, sagdur at verða klárur at seta í verk sum ein kunngerð til 1´sta november í ár. Hvussu greinað og grundað slíkt uppskot kann blíva tikið burtur úr einari heild kann ivast í. Um gingið verður eftir teim 50% í orkuminking sum t.d. nýggir bygningar skulu standa fyri, um hetta er tað arbeitt verður eftir, so er verandi orkunýtsla í miðal umleið 300kWtímar/m2/pr ár fyri eini sethús á 100m2, og er helvtin sostatt 150kW tímar, ella tvær ferðir tað t. d. danska byggireglugerðin í løtuni setur sum hægsta mark, ið ætlandi verður hert enn meira komandi ár. Áhugavert verður tí at síggja hvat støðið verður her í landinum, men kann ein hava illgrunan at mest loyvda orkunýtsla til t.d. sethús verður væl omanfyri 100kWtímar/m2/ár.

**Ferðsla**

At bilparkin kann minka sína orkunýtslu við einari helvt til 2020 er rættuliga optimistiskt. Ítøkiliga er ferðslan trupul at viðgera tá einstaklingurin sjálvur ger av slag av bili, motorstødd v.m. Álitið frá Innlendismálaráðnum ber eisini á tann bógv, tá einki ítøkiligt kann sigast um hvussu orkusparandi akfør verða komandi árini, men at mark er fyri hvussu effektivir kompressiónsmotorar kunnu blíva. 50% sparing á bensin- ella oljunýtslu letur tað seg ikki gera uttan so at onnur tøkni t.d. battaríir verða sett afturat motorinum (hybridloysn). Sagt verður at ein munandi partur av akførunum fer at brúka varandi orku, ið roknast við merkir ravmagnsbilar. Her er eisini talan um metingar og einki ítøkiligt m.a. tí tøknin er so nýggj og tøkniligir trupulleikar eru við battaríbilum og harnæst er ógreitt hvørja einsháttaða loysn bilframleiðarar leggja seg eftir til løðing.

Biobrennievnisbilar er eitt fjøltáttað hugtak. Er talan um plantu- ella aðra olju, ella er talan um ethanol ella methanol? Álitið sigur at biobrennievni verður tøkt tá hesir bilar koma á marknaðin.

Avgjøld og fíggjarlig stýringsamboð eru sett í verk, og kunnu slík stuðla orkuminking rætta vegin, tó at tøkniligar loysnir ikki enn eru komnar hartil at nakað ítøkiligt kann setast í verk fyrstu 2-3 árini.

**Ravmagnsframleiðsla**

Tað sum er mest ásýnligt í tilmælinum er einasta ítøkiliga uppskotið, at Víkarvatn kann takast til vatnorku saman við Eiði 2, ið sum kunnugt er sett í verk. Tilmælið vísir til at SEV til 2020 skal økja sína orkuframleiðslu frá verandi umleið 260mill.kWtímar til 365mill.kWtímar um árið. Hetta skal gerast við 60mill.kWtímar frá útbygging av vatnorku, 30mill. kWtímar frá vindorku, og 30mill.kWtímar frá øðrum varandi orkukeldum, ið skulu setast til pumpuskipan ætlað at røkka eina meira støðuga nýtslu frá vatnorkuni. Her resta í 20mill.kWtímar til at røkka teim ætlaðu 365mill. kWtímunum. Hvar hesar 20mill.kWtímar eru í roknistykkinum sæst ikki í tilmælinum, men kann vera at hesar liggja í størri gagnnýtslu av spillorku frá m.a. Sundsverkinum – tó at talan tá ikki er um ravmagnsorku, men hitaorku.

Gjøgnumgangandi er taltilfarið ikki nóg greitt til at ein fullgóð mynd fæst úr tilfarinum frá Innlendismálaráðnum. T.d. verður nevnt at varandi orkuparturin verður øktur frá verandi 40% frá vatn- og vindorku til 75% í 2020. Hetta hongur ikki saman tá verandi 40% ella 104mill. kWtímar skulu økjast við 120mill.kWtímar til íalt 224mill.kWtímar ella góð 62% varandi orkuframleiðsla.

**Skip og flogfør**

Flogfør og skip kunnu javnsetast við flutning á landi, ið er torførur at meta um tá orkusparandi tøkni bæði skal mennast á fleiri stigum, á motorkraftina í mun til streym- og vindviðurskifti, ella um fiskað verður ella siglt á fiskileið. Nýggja diesel-elektro tøknin til skip kann minka orkunýtsluna upp til 20% og kann allarhelst saman við telduforritum minka enn meira um orkunýtslu. Kvotuskipanin hevur verið umrødd alment har mælt hevur verið til at seta $CO_2$-kvotur í staðin fyri galdandi fiskidagskipan. Hetta sýnist meira greitt og einfalt enn verandi skipan og kann allarhelst eisini lætta um talgildu sporførisskipanina.

**Samanumtikið**

Fyrst kann sigast at tað er gott at nakað er komið ítøkiliga á borðið og at landsstýrið og løgting kann semjast um eina felags ætlan. At tilfarið er ein dekan upptintur drykkur, har ætlanarstøðið ikki er nakað av reypa av, so sýnist ikki sum at procentvísa býtið millum hús/bygningar, ferðslu, ravmagnsframleiðslu og skip/flogfør er gjøgnumhugsað.

50% orkuminking á allar bygningar landsins upp á 10 ár er ikki trúverdugt, ferðsluparturin er lítil í mun til hinar tríggjar størru orkubólkarnar og kann ein við fleiri ókendu faktorunum ivast í um ein helvtarminking er møgulig. Undrunarvert er t.d. hví ein stórbrúkari sum SEV skal sleppa so lætt í síni fossilu orkunýtslu. Vit hava sambært Risø-kanningini av el-netinum pláss fyri 8MW til 12MW av vindorku á netinum afturat teim 4,2MW sum eru sett upp. Framleiðslan kann her blíva millum 35mill. kWtímar (tilmælið nevnir 30mill.kWtímar) og 53mill.kWtímar. Kostnaður til 8MW vindorku er góðar 60mill.kr. ella 10% til 15% av tí ætlanin er at nýta til enn eina tøku av einum fjallavatni – Víkarvatn.

Undrunarvert er at tilmælið nevnir møguliga framtíðar sjóvarfallsorku til veitan av ravmagni til pumpuskipan. Sjóvarfall gevur heilt serstaka dygdarorku, ið ikki er nervað av veðurlagnum, og kann hon neyvt forritast og samankoyrast við aðrar varandi orkukeldur.

Annað av týdningi, sum ikki verður greinað í tilmælinum er, hvussu SEV kemur fram til at vit skulu útbyggja varandi orkukeldurnar við júst 120mill. kWtímum. Her er nokk framt eitt skjótt roknistykki og býti millum ravmagn til hitapumpur og ravmagn til løðing til bilar. Helvtin av bilparkini (10.000 bilar) koyrir í 2020 á battaríir við einum miðal tørvi á umleið 8.000kWtímar pr. ár. Íalt 80mill.kWtímar. Og helvtin av øllum bygningum nýta hitapumpu við COP3,5 við orkutørvi á 150kWtímar/m2/ár. Ravmagnstørvurin verður her umleið 40mill. kWtímar, í alt 120mill. kWtímar.

Um hugt verður eftir nøkrum av teim veðurlagsætlanum lagdar eru fram uttanlands, so er talan um sera útgreinað og gjøgnumarbeitt tilfar á fleri hundrað síður. Næst kann tað tykjast fullkomuliga ábyrgdarleyst av landsins politisku leiðslu at skrotta ætlaða orkuráð. Við tonkum aftur á gamla Orkuráðið mannað av óheftum serfrøðingum og tey ráð vit tá fingu um hvussu vit kundu útbyggja vatnorkuna á burðardyggan hátt, og so úrslitið við síggja í dag við Eiðisverkætlanunum, er nakað, ið átti at fingið onkran politikara upp úr stólinum. Tilmælið sigur beinleiðis at tað ikki verður mett skilagott at seta eitt orkuráð á stovn. Grundgevingin er at tað longu finnist serkunnleiki í landinum, og at "*tørvurin á ítøkiligari ráðgeving bert er viðkomandi í mun til týðandi orkuspurningar av stórum samfelagsligum týdningi, sum bert sjáldan koma fyri.*"

Mælt verður tí til at raðfesta og brúka tann førleika, sum longu er, sum tað stendur orðarætt.

Heilt fantastiskt! Fyrst hevur samfelagið ein ovurhonds stóran trupulleika innan loysn á orkuveitingini í dag, og enn meira komandi ár. Veðurlagsbroytingar trýsta heimssamfeløgini til sum skjótast at fremja aðrar orkutøkniligar loysnir, ið vísa seg at verða ovurtorførar og kostnaðarmiklar at fáa bilbukt við upp á stutta tíð, men orkuráð.....nei, tað hava vit ikki brúk fyri!!!!!

**Nevndin, Føroya Náttúruverndarfelag**
*12. nov. 2009*

# Yvirtøkumál

**PALLI DALSGAARD**



Tað er at fegnast um, at onkur er á tingi, sum dugir sær hógv og torir at halda aftur

At yvirtaka mál í hesum tíðum er so ørt, sum hugsast kann.

Sannheitin er tann, at alt ov nógv er yvirtikið, sum er, men tað má so verða, nú má svíða sum svøllir, hvat tí viðvíkur.

Tað er illa umhugsað, at slík mál koma á tingborð, óansæð um tey kosta lítið ella stórt. At rópa tað valstríð í Javnaðarflokkinum førir við at verða ímóti yvirtøkuni av hesum lítla málið, kunnu vit altíð trætast um.

Men seinasta veljarakanning, hon var ein ógvuslig ávaring til flokkin, hvat yvirtøkum viðvíkur. Tey gomlu og veiku eru blivin bangin, tey duga at hugsa.

Hvaðan skal pensónin koma, tá Føroyar eru blivnar ein sjálvstendigur statur? Hon kemur ikki upp úr jørðini. Javnaðarflokkurin verður noyddur at koma sær aftur á jørðina, hann hevur flogið alt ov høgt hesa seinastu tíðina.